

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 09 - 2012

# Russiska oljuframleiðslan metstór

Russar framleiða nú olju sum næstan ongantíð fyrr. Ein uppgerð frá orkumálaráðnum í Moskva vísir, at í august var framleiðslan 10,38 milliónir tunnur um dagin, og so stór hevur framleiðslan ikki verið, síðani Sovjetsamveldið datt sundur í 1991. Tann stóra framleiðslan hevur ovurstóran týdning fyri Russland, tí 49 prosent av inntøkunum hjá ríkiskassanum stava frá handli við olju og gassi. Forsætisráðharrin, Dmitri Medvedev, er eisini væl nøgdur. Hann sigur, at sum heimsins størsti olju- og gassútflytari er Russland komið í ta støðu, har landið eigur at vera. Orkumálaráðharrin, Alexander Novak, segði í einari yvirlýsing, at 30 prosent av landsins bruttotjóðarframleiðslu stavar frá orkugeiranum, og at hetta er væl meiri enn undanfarin ár. Hann mælti samstundis politikarunum at broyta skattareglurnar, so at meiri fer í ríkiskassan heldur enn í kassarnar hjá oljufeløgunum. Serfrøðingar hava róð uppundir, at oljufeløgini økja framleiðsluna fyri at fáa sum mest burtur úr tí høga prísinum, áðrenn avleiðingar av kreppuni í evruøkinum fara at gera, at prísurin lækkar aftur.